Sjálvandi høvdu trý stig verið at fyritrekt, men nú er tað soleiðis, at vit nú hava fingið eitt stig aftrat og tað er positivt í mun til keðiligu úrslitini tveir seinastu dystirnar.

Julian Johnsson, B68-miðvallari

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

ÍTRÓTTUR

Skerdir sundalagsmenn skulu fóta sær ímóti ÍF

Felagsliðið úr sundalagnum er rættiliga skert og mugu vera fýra leikarar fyri uttan, meðan tey í Fuglafirði vóna at Bartal og Símin Eliasen gerast tøkir

FÓTBÓLTUR

Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Sundalagsmenn eru rættiliga skerdir, nú teir skulu taka útsetta dystin móti fuglfirðingum uppaftur. Dysturin átti upprunaliga at verið leiktur áðrenn summarsteðgin, og menn fóru eisini undir at spæla dystin, men veðrið varð so ófantaligt tá, at dysturin varð avblástur.

Teir báðir miðvallarleikararnir, Knút Vesturtún og Ronnie Samuelsen, fingu báðir gult kort fyri fimtu fer í ár, tá teir vitjaðu í Gundadali sunnudagin, og soleiðis kunnu teir ikki vera við mikukvøldið.

Marni Djurhuus er ikki klárur enn eftir skaðan hann fekk í móti HB, og lítið røkist fyri, at hann verður tøkur sunnudagin móti NSÍ heldur. Fjórði maðurin, ið hevur meldað avboð er Jørgin Meitilberg. Hann hevur seinastu tíðina verið plágaður av einum skaða í lærkrikanum, og verður hann heldur ikki partur av hópinum hjá EB/Streymi í annaðkvøld.

Ronnie Samuelsen og EB/Streymur máttu lúta ímóti B36 sunnudagin. Nú skal EB/Streymur royna at fóta sær á heimavølli, men Ronnie kann ikki spæla við

Mynd: Sofus Johannesen

Tvær ferðir Eliasen ivasamir

Í Fuglafirði er standurin betri enn á Mølini. Teir báðir Bartal og Símin Eliasen fingu hvør sín snudd í dystinum móti Skála sunudagin, og vandu tí ikki mánakvøldið.

Við Bartal Eliasen stúrdu tey í Fuglafirði fyri, at hann hevði brotið óstbeini, men røntgenmyndir tiknar mánadagin staðfestu, at talan var ikki um brot.

Tí vænta tey, at hann á sama hátt sum Símin verður við mikukvøldið á Mølini á Eiði. Eisini kemur tað væl við, at Frank Poulsen er tøkur aftur eftir leikbannið seinasta dyst.

Í Fuglafirði eru tey so smátt farin at síggja veruleikan í eyguni. Um teimum skal vera lív lagað í bestu deildini, mugu og skula nøkur stig á kontoina.

Tí er ikki nóg mikið at seta nøsina upp eftir einum javnleiki mikukvøldið, hóast talan er um ein dyst móti oddaliðnum. Og tá EB/Streymur eisini hevur brúk fyri trimum stigum fyri at tryggja sína oddastøðu betri, so er lagt upp til ein spennandi dyst á Mølini mikukvøldið.

Dagfinn Olsen dømir dystin.

Lagnuløta í Gundadali

Bæði fyri B36 og NSÍ er tað møguleikin fyri at vera við í toppstríðnum, sum stendur upp á spæl í annaðkvøld

UPPTAKT

Jákup Mørk

Møguleikin fyri at vera við í toppstríðnum stendur upp á spæl, tá ið B36 mikukvøldið fær vitjan av NSÍ. Talan er um útsettan dyst frá 16. umfari, tá ið B36 var upptikið av europeisku kappingini, sum nú skal fáast frá hondini.

NSÍ hevur verið tríggjar ferðir í Gundadali í ár, og teir hava bara fingið eitt stig. Teir hava tapt tvær ferðir móti HB, men teir megnaðu 1-1 móti B36.

Hjá B36 er tað ivasamt, um miðvallarin Mikkjal Thomassen og álopsspælarin Bergur Midjord verða førir fyri at spæla. Báðir lyklaspælararnir fóru av vøllinum, tá ið B36 sunnudagin vann móti oddaliðnum EB/Streymi.

Tað er møguleiki fyri, at ungu menninir, sum fyrr í ár hava staðið seg so væl, fara at fáa kjansin. Eitt nú Johan Ellingsgaard og Johan V. Gunnarsson.

Hjá B36 ræður tað um at finna stevið frá sunnudegnum og fyri alt í verðini ikki at detta í vánaligu grøvina, sum teir vóru í næstsíðsta leygardag, tá ið teir høvdu vitjan av KÍ. Tann dystin hava teir í B36 sjálvandi gloymt!

Trý leikbann

Í NSÍ var tað stórt vónbrot, tá ið teir enn eina ferð snávaðu, tá ið teir sunnudagin á heimavølli skuldu lyfta seg upp á síðuna av oddaliðnum.

Móti B36 eru tríggir av NSÍ spælarunum leikbannaðir. Miðvallarin Jústinus R. Hansen hevði bara verið lítla løtu á vøllinum, tá ið hann eftir tvey gul kort sá reytt móti HB. Brynjolvur Nielsen hevur verið vongverji í høgru mest sum alt árið. Sunnudagin er málskjúttin móti HB leikbannaður, tí hann hevur ov nógv gul kort á kontini. Og síðani er tað málmaðurin Jens Martin Knudsen, sum fekk tveir dagar leikbann fyri reyða kortið í Fuglafirði.

Stóri spurningurin er, hvønn Trygvi Mortensen fer at seta á høgra vongverja. Ein møguleiki er vinstrabeinti Einar Hansen, og ein annar møguleiki er Helgi L. Petersen, sum higartil í ár hevur verið álopsspælari, miðvallari og miðverji.

Petur Reinert verður 23. maðurin á vøllinum í Gundadali mikukvøldið.

Formula-deildin

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	EB/S	19	11	-	5	-	3	46	22	24	38
2	HB	20	10	-	6	-	4	44	32	12	36
3	NSÍ	19	10	-	5	-	4	40	24	16	35
4	B36	19	9	-	6	-	4	31	22	9	33
5	KÍ	20	8	-	8	-	4	42	26	16	32
6	GÍ	20	7	-	10	-	3	25	20	5	31
7	Skála	20	6	-	5	-	9	26	22	4	23
8	VB/S	20	4	-	4	-	12	18	54	-36	16
9	B68	20	2	-	5	-	13	21	45	-24	11
10	ÍF	19	2	-	4	-	13	19	45	-26	10

Rumica fer at venja Nøvuna

Unga manningin hjá Nøvuni hevur fingið Rumica sum venjara, og byrja teir fyrireikingarnar til kappingarárið longu í kvøld, tá fyrsta venjingin undir nýggja venjaranum verður

FLOGBÓLTUR

Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Flogbóltsfelagið Nøvan hevur gjørt avtalu við Rumica, um at hann skal vera venjari hjá teirra mansliði í meistaradeildini. Tað váttar Pól Andreassen, nevndarlimur og kappingarleiðari hjá Nøvuni

Rumica var í fjør venjari hjá meistaraliðnum Fleyr, og hevur hann áður verið venjari hjá Fram. Eftir hvat skilst, so hava fleiri feløg verið úti eftir Rumica, men hann hevur so tikið Nøvuna fram um hini liðini, og byrja teir at venja í vikuni.

Nøvan hevur eitt rættiliga ungt lið, ið er mannað við evnaríkum leikarum úr Sundalagnum. Hetta er nakað, ið Rumica dámar væl og Pól Andreassen sigur, at tey í Nøvuni eru sera spent upp á komandi kappingarár.

Seinasta kappingarár var so sum so hjá Nøvuni. Liðið varð flutt upp í bestu deildina fyri at tað heila kundi ganga upp har, og hóast unga manningin hjá Nøvuni royndi alt hvat teir vóru mentir, so eydnaðist tað ongantíð teimum at vinna nakran dyst - ei heldur nakað sett.

– Vit eru ógvuliga spent at fara undir eitt nýtt kappingarár við einum so góðum venjara, og tað gleða vit okkum til. Serliga tí, at vit alt seinasta kappingarár virkaðu so at siga uttan venjara.

– Men liðið er so øgiliga ungt enn, og vit hava ongan útlendskan styrk í mun til so nógv onnur lið, so okkara málsetningar eru rættiliga avmarkaðar. Fyrsta stigið má vera at vinna eitt sett, og síðani taka vit tað harfrá, sigur Pól Andreassen, nevndarlimur og kappingarleiðari hjá Nøvuni.